## Honda Civic Hybrid



Honda koma á evropeiska marknaðin við einum Civic Hybrid komandi vár. Bilurin hevur eina dupulta motorskipan, ið kann koyra uppá bæði elmegi og bensin. Sølan byrjar í Onglandi, men bilurin kemur væntandi ikki til Danmarkar orsakað av ov høgum avgjøldum

*Kelda: bilpriser.dk*

## BMW Z4



BMW Z3, ið kom á marknaðin í 1995, verður nú avloystur av Z4, ið er 12 cm longri. Bilurin fæst einans við 6 syl. motorum ið eru ávikavist 2.5 og 3.0 litur

*Kelda: Bil Magasinet*

## Toyota Pre-crash Safety



Toyota hava gjørt eina nýggja trygdarskipan, "Pre-crash Safety", ið kann merkja nær ein samanstoytur, ið ikki slepst undan, er við at henda. Skipanin aktiverar elektroniksku strammararnar í trygdarbeltunum og regulerar bremsukraftina, alt eftir hvussu fast bilførarin traðkar á bremsupedalin

*Kelda: bilpriser.dk*

# Würth »ORSY« – ordan og system í vørubilinum



*"ORSY" stendur fyri orden og system. Tað kann av røttum sigast um slíka innrætting*

**Würth, ið bleiv stovnað í Týsklandi í 1945, er í dag ein heimsumfatandi fyritøka við 38.000 starvsfólkum í 85 londum. Teir hava serkunnleika í framleiðslu av t.d. hond, luft og el-amboðum, kemiskum produktum, goymsluloysnum, skrúvum og møtrikum v.m.**

INNRÆTTING

*Magnus Gunnarsson*

Würth Danmark bleiv stovnað í 1964 og starvast í dag um 400 fólk. Síðan 1998 hevur Würth Danmark A/S havt eitt umboð í Føroyum. Talan er um Claus Christensen í Havn, sum hevur ferðast kring landið sum sølumaður síðan 1998. Claus hevur starvast hjá Würth Danmark A/S síðan 1994. Fyrsta apríl í ár varð Bernhard Jacobsen á Eiði einisi settur í starv sum sølumaður í Føroyum. Teirra kundar eru serliga fyritøkur í bil, metal, el og byggivinnuni.

**ORSY mobil system**

Nú bjóðar Würth seg eisini fram við einum nýggjum "ORSY mobil" systemi til innrætting av øllum sløgum av vøru- og arbeiðsbilum. "ORSY" stendur fyri "Orden og System". Endamálið er at hava skil og ordan í tingunum í bilinum, eins og á goymsluni ella á verkstaðnum. "ORSY" er gjørt í modulum, ið kunnu innrættast, alt eftir hvat bilurin verður brúktur til.

Við hjálp av CAD-tøknini (Computer Aided Design) kunnu teir við telduni tekna eina skræddaraseymaða loysn til innrætting av arbeiðsbilinum. Tá kundin hevur útfylt eitt skema, har hann sigur hvat slag bilurin er, hvussu hann ynskir at bilurin skal verða innrættaður, og hvat hann skal brúkast til, fær hann eitt telduteknað uppskot frá Würth, um hvussu innrættingin kann síggja út.

Áhugaði kunnu venda sær til Claus Christensen telefon 225017 ella teldupost claus@post.olivant.fo




*Við hjálp av CAD-tøknini(Computer Aided Design) kunnu teir við telduni tekna eina skræddaraseymaða loysn til innrætting av øllum vøru- og arbeiðsbilum*



*"ORSY mobil" systemið kann brúkast til øll sløg av vøru- og arbeiðsbilum*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum




**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan, Km 2000. 99.000.
Kr. 64.500.



**CITROEN XANTIA 2.0HDI 5H**
Árg Juni, Km 1999. 160.000.
Kr. 43.000.



**MITSUBISHI PAJERO 2.8TDI**
Árg Sept, Km 1997. 177.000.
Kr. 82.000 .



**MITSUBISHI CARISMA 1.6I 5H**
Árg Mars, Km 1997. 105.000.
Kr. 64.000.



**JEEP CHEROKEE 2.5TD VAN**
Árg Juli, Km 1997. 135.000.
Kr. 80.000.



**PEUGEOT 306 1.9D 4H**
Árg Apríl, Km 1995. 80.000.
Kr. 152.000.



**CITROEN XSARA 1.9TD 5H**
Árg Juni , Km 1999. 137.000.
Kr. 117.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg Mars, Km 1999. 160.000.
Kr. 45.000.



**MITSUBISHI GALANT 2.0**
Árg Juni, Km 1992. 37.000.
Kr. 150.000.



**FORD MONDEO 1.8 4H**
Árg Juni, Km 2001. 210.000.
Kr.
16.000.



**MAZDA DEMIO 1.3 5H**
Árg Feb, Km 1999. 87.000.
Kr. 50.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
Árg August, Km 1999. 115.000.
Kr. 36.000.



**CITROEN XSARA 1.6I STC**
Árg Apríl, Km 1999. 133.000.
Kr. 36.000.



**SUZUKI BALENO 1.6I 4H**
Árg Apríl, Km 2000. 105.000.
Kr. 27.500.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS

**Ivan Johansen Bilar**

Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo


